## Leita eftir Snorra

Norðmenn eru nú farnir at spyrja, hvat varð av standmyndini, sum bleiv reist í Oslo til minnis um navnfrægа søguskrivaran Snorra Sturluson. Standmyndin bleiv avdúkað tann 23. september í 1941, men sambært norsku tíðindastovuni bleiv hon tikin niður í 1945 eins og fleiri av teimum standmyndum, sum Quisling-stýrið reisti, meðan tað sat við valdið. Sambært NTB er ætlanin nú at kanna, hvat varð av standmyndini av Snorra.



## Flúgva innanlands

Ísland er sum kunnugt eitt stórt land eftir okkara viðurskiftum, og tað ger, at nógvir íslendingar ferðast við flogfari, tá teir ferðast innanlands. Tað gera altsamt fleiri, og í ár fer ferðafólkatalið á innanlandsrutunum fyri fyrstu ferð upp um eina hálva millión. Í fjør var talið 427.000, so vøksturin í ár er heili 17 prosent, skrivar Vísir. Tað eru serliga ruturnar millum Reykjavík, Ísafjørðin, Akureyri og Egilsstaðir, sum eru væl umtóktar.

# Fiskimenn eiga ikki at vera bangnir fyri at leggja fiskiflotan



**- Verða fiskimenn koyrdir í land, tí teir vísa til sáttmálan, fer hetta at fáa álvarsligar fylgjur. Vit noyðast at standa sum ein maður móti áganginum – ella verða vit misnýttir. Fiskimenn eiga ikki at verða bangnir fyri at leggja flotan. Hetta skal ikki verða nýtt sum nøkur hóttan, men skal takast í fullum álvara, segði Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag á landsfundi í morgun**

LANDSFUNDUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag halda trý feløg, sum umboða fiskimenn og siglandi, sínar árligu fundir í Norðurlandahúsinum.

Føroya Fiskimannafelag heldur landsfund, og Føroya Skipara- og Navigatørfelag heldur aðalfund. Aftrat hesum báðum feløgunum, halda Føroyskir Fiskimenn Uttanlands eisini sín aðalfund í dag.

### Lág eftirløn

Eitt av málunum, sum formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, nam við í síni ársfrágreiðing í morgun, var eftirlønin.

- Fiskimenn hava lága eftirløn, og tí leggja vit dent á at fáa hana upp á eitt støði, sum gevur fiskimonnum góðar fíggjarligar karmar, tá ið teir gevast at sigla eftir eitt langt og strævið arbeiðslív.

Jan segði, at tær 52 krónurnar, sum ein fiskimaður fær sum kapitalpensjón fyri hvønn virknan dag, er einans ein fjórðingur av tí, sum ein nøktandi eftirløn eigur at verða.

- Vanligt er nógvastaðni, at arbeiðsgevarar gjalda 2/3 av eftirlønini, meðan starvsfólk gjalda 1/3. Sum støðan er nú, gjalda reiðarar 30 krónur og fiskimenn 22 krónur av 52 fyri hvønn virknan dag.

Formaðurin vísti á, at Sjómannadeildin hjá Føroya Fiskimannafelag hevur ta skipan, at limirnir fáa 5% av lønini í eftirløn.

- Um vit skulu fylgja tilmælinum hjá Fíggjarmálaráðnum, skulu skulu limirnir í deildini upp á 12-15% av lønini. So, her er nakað eftir á mál, segði hann.

### ALS og trygd

Jan segði, at ALS-málið, sum hann rópti tað, er komið til eitt vegamót.

- Vit hava nú í nógv ár á friðarligan hátt roynt at fingið útgjald, tá ið fiskimenn gerast arbeiðsleysir, men fordómar og óndskapur hava gjørt, at arbeiðsleysir fiskimenn sum oftast einki fáa.

Formaðurin helt, at fiskimenn eiga at gera bart, tá ið slíkar beistagerðir, sum hann rópti tað, verða framdar.

- Vit eiga at leggja flotan beinanvegin, um ikki úrslit spyrst burtur úr. Endurgjaldið fyri mista inntøku eiga vit at fáa úr landskassanum, tí tað eru fiskimenn, sum fylla í landskassan, segði hann

Jan Højgaard helt fyri, at fiskimenn eru sera illa fyri, tá ið ræður um trygd.

- Hetta kann lýsast í fleiri stigum – heilt frá trygdini umborð til fíggjarligt endurgjald. Einki er at taka seg aftur í, at tryggingarlóggávan er sera vánalig. Fyri tað mesta er tað bara tryggingin, sum hevur nakað at skula siga. Brúkarin er als ikki vardur. Tað er heldur soleiðis, at brúkarin kennur seg útnyttaðan.

Formaðurin segði, at soleiðis sum støðan er nú, er tað beinleiðis óforsvarligt at senda fólk út á havið at arbeiða.

- Hetta kemst av, at havið er eitt vandamikið arbeiðspláss og at kalla einki eftirlit er við arbeiðnum umborð, hóast so sigst vera.

Jan legði aftrat, at tá ið menn sigla undir so vandamiklum umstøðum, mugu almennu Føroyar syrgja fyri, at lóggávan á økinum er so mikið góð, at menn klára at lívbjarga sær og sínum, um illa vil til.

### Tveir kostir

Hann helt, at bert tveir kostir eiga at vera í at velja.

- Vinnumálaráðið eigur at fáa valið ímillum at syrgja fyri nøktandi trygd – ella, at arbeiðið verður niðurlagt. Tað kann tykjast, sum hetta eru hørð krøv, men vit hava í ártíggjur gjørt vart við trupulleikan.

Formaðurin helt fyri, at fiskimenn fara ikki at bíða longur.

- Vit hava longu bíðað ov leingi, og hetta hevur kostað okkum nógvar syndarligar lagnur. Soleiðis skal tað ikki verða í framtíðini.

Hann helt tað annars vera heilt burturvið, at fiskimenn gjalda inntøkutapstrygging, tá ið hendan bert er galdandi í einstøkum førum.

- Vit síggja alt ov ofta, at menn einki fáa, tá ið skipið, teir eru við, er til umvælingar. Dømir eru eisini um, at menn ganga í mánaðir og bíða eftir skipinum – uttan at fáa eina krónu. Onkur kann freistast at siga, at fiskimenn, ið koma soleiðis fyri, kunnu finna sær annað arbeiði, meðan skipið liggur, men hetta er tó ikki so einfalt. Menn eru bundnir at skipinum og hava skyldu til at vera klárir, tá ið skipið loysir aftur til fiskiskap.

Jan skar tí málið út í papp og segði:

- Kravið er einfalt: Løn, meðan skipið er til umvælingar.

### Sáttmálarnir

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag nam eisini við spurningin um sáttmálarnar og segði, at felagið fer at leggja doyðin á, at hesir verða hildnir.

- Tað eru einstakir reiðarar, sum bróta sáttmálan. Eg havi verið umborð á skipi, sum breyt sáttmálan – ikki bara í einum føri, men í tveimum førum. Í fyrsta lagi fekk manningin ikki fríð millum túrar – og fyri tað næsta fekk hon ikki løn fyri arbeiði, hevði gjørdi.

Jan segði, at felagið ringdi til reiðaran beinanvegin.

- Svarið, eg fekk, gjørdi meg ikki sørt bilsnan. Hann segði bart út, at tað ikki altíð er neyðugt at halda sáttmálan, tí manningin fekk aðrar sømdir. Tað, sum menn ynskja, er at hava frí, tá ið teir eru heima, og tað hava teir sambært sáttmálanum eisini krav upp á.

Hann legði dent á, at manningin ikki skal lata seg trýsta undir nøkrum umstøðum.

- Vit eru noyddir at berjast fyri okkara rættindum. Hetta kann kosta í fyrsta



*Menn skifta orð um ymiskt, áðrenn farið verður á fund í Norðurlandahúsinum í morgun*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*